# Í sjóroki og brimduni

## - nakrar hugleiðingar um Svínoynna



**HUGLEIÐING**

*Óli A. Reinert á Geilini*

*"Tókst hav í miklum harmi,
men høga bergið stóð;
bar hvítan sjógv á barmi
og fram í brimið vóð."*

Við hesum orðum endar Hans Andrias Djurhuus yrkingina um deyðastund Gøtutróndar. Hóast mangt kundi verið at sagt um hesa yrking, var tað tó ikki hana, eg í fyrstu syftu ætlaði at umrøða í hesi grein, men hesi orð runnu mær í huga nú ein dagin, eygað var hyggjandi út á Svínoyarvík, har Dragin vóð upp undir hálsin í skúmandi landsynningsbrimi, meðan sjórokið hevjaði seg til skýggja og tók leiðina niðan mót Skúvaskarði. Stinnur stóð hann har, hesin risi í Atlantshavi, og vardi borg mót stormi og hóttandi bylgjum, ið brustu við øgiligum smelli mót klettinum, so tað dundi í homrum og fjøllum.

Soleiðis hevur hann staðið í øldir. Í ódn sum í logn hevur hann stinnur og trúfastur borið merki svínoyinga, meðan ættarlið eftir ættarlið av monnum og kvinnum, ið myndað hava bygdarlívið í oynni, er farið undir flag. Á døgum Svínoyarbjarna var oyggin høvdingasetur, og man ikki Bjarni eisini onkra illveðursløtuna hava eygleitt henda risa, sum í hørðum bardaga við veður og vind er farin vaðandi út í brimið við hvítum sjógvi á barmi?

Aldagomul er oyggin, og aldagomul er bygdin. Her hava fólk livað sítt dagliga lív í gleði og sorg. Hava røktað haga og bø og verið ein sjálvsagdur partur av føroyskari søgu og mentan. Ja, í farnum døgum taldist bygdin millum tær frægu í landinum og smæddist ikki burtur millum aðrar. Tíðirnar vóru jú øðrvísi. Føroya land var ikki samanbundið við vegum og tunlum, og hóast oyggin lá í sama stað sum nú, minni enn ein fjórðing frá Borðoynni og Viðoynni, so kendist frástøðan fyri nærmastu grannarnar kanska ikki so stór kortini, tí øll livdu jú undir at kalla somu korum, tá farast skuldi millum bygdir. Antin varð farið upp um fjøll til gongu ella sjóvegis við báti. Av tí sama var tað ikki so stórur munur á hjá fólki av Viðareiði ella innan av landi antin at leggja leiðina út til Svínoyar ella fara til Klaksvíkar. Ja, í mongum førum var tað kanska bæði lættari og skjótari at fara til Svínoyar. Tær tríggjar oyggjarnar, Fugloyggin, Svínoyggin, Viðoyggin og bygdirnar á eystaru síðu á Borðoynni vórðu tí eisini í mongum førum roknaðar sum eitt øki fyri seg, og sæst hetta framvegis aftur í grindabýtinum, tá býtt verður til bygdirnar fyri eystan Múla. (Múlin er norðurendin á Borðoynni)

Men tíðir broytast. Seinastu 40 – 50 árini hava stórar íløgur verið gjørdar fyri at bøta um samferðsluna í Føroyum. Havnir, vegir og nýggj skip hava gjørt tað munandi lættari at ferðast millum oyggjar og bygdir, og nú er tað ein veruleiki, at tað er bæði lættari og skjótari at fara av Viðareiði til Havnar enn at fara til Svínoyar. Tiltikna ferðin, ið Pætur í Uppsølum á sinni gjørdi úr Klaksvík til Gásadals, tekur nú lítið meiri enn ein góðan tíma í bili, hóast ikki færri enn tríggir firðir eru at fara um. Samstundist má tó ásannast, at tað tekur longri tíð og er mangan bæði truplari og baldrutari at fara úr Klaksvík til Svínoyar, hóast geografiska frástøðan er munandi minni.

Tað er tí við stórum harmi, at vit, ið varða av Svínoynni, mega ásanna, at teir politikarar, ið valdað hava á Føroya Løgtingi seinastu mongu árini, als ikki hava tikið svínoyingar í álvara, men hava hildið tað verið í fínasta lagi, at meðan onnur skulu sleppa at ferðast Føroya land runt í bili uttan stórvegis hóvasták, skulu svínoyingar og onnur, ið ferðast við Másanum, passa sær løgir millum aldubrotini fyri at sleppa so nøkulunda turrskødd í land ella umborð.

Hóast svínoyingar fyri skjótt 30 árum síðani bóru fram ynski um at fáa gjørt ein tunnil til Havnar (Havnina á Svínoynni, ikki til høvuðstaðin, Tórshavn.) er einki hent annað enn tað, at brimið hevur máað eitt sindur meira burtur av kaikantinum, og Másin nú er farin at leka verri enn nakrantíð.

Hetta ynski varð borið fram, tí Havnin er kyrrasta pláss á Svínoynni, og um ferjulega varð gjørd har, so var stutt inn í Sund ella inn á Norðtoftir, og fyri tey ferðandi hevði tað verið ein munandi styttri og minni baldrutur túrur, enn tað ofta er á verandi farleið, har tað kann